# FYRIBILSAVTALA

## millum Fjølrit og ________ kommunu
## um nýtslu av vardum verkum
## til undirvísingarvirksemi og innanhýsis nýtslu

**FJØLRIT** er góðkendur felagsskapur sambært § 40, stk. 1 í løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2015 um upphavsrætt.

Limir í Fjølrit: Rithøvundafelagið, Felagið Føroysk Tónaskøld, Føroyskir Yrkisfotografar, Føroysk Bókaforløg, Føroysk Miðlafólk og Føroysk Myndlistafólk. Í avtaluhøpi umboðar Fjølrit allar rættindahavarar innan hesi øki: tekstir, myndir og nótar.

Fjølrit hevur, sum er, B-avtalu við Copydan Tekst & Node, Kopinor, Fjölis, Kopiosto og Bonus Presskopia, ið heimilar Fjølrit at gera avtalur við brúkarar í Føroyum um brúk av donskum, norskum, íslendskum, finskum og svenskum verkum.

Kommunan ger hesa avtalu vegna sínar kommunalu undirvísingarstovnar, smb. § 13 í upphavsrættarlógini, og kommunalar skrivstovur og stovnar, sum í sínum virksemi brúka upphavsrættarliga vart tilfar, smb. § 14 í upphavsrættarlógini.

**§ 1: Nýtsluøkið avtalunnar**
Avtalan gevur einstøku skúlunum og stovnunum hjá kommununi samsvarandi ásetingunum í hesi avtalu og samsvarandi lóg um upphavsrætt, rætt til at endurgeva, ljósrita, avrita, fjølrita ella á annan hátt at margfalda eintøk av útgivnum verkum til brúk innan undirvísingarvirksemi, smb. § 13 í upphavsrættarlógini.

Stk. 2. Harumframt gevur henda avtala kommununi og stovnum tess rætt at framleiða eintøk av vardum verkum til innanhýsis nýtslu, sbr. §§ 14 í upphavsrættarlógini.

**§ 2: Nýtsla innan undirvísingarvirksemi**
Avtalan fevnir um framleiðslu av eintøkum av øllum útgivnum verkum, tað veri seg føroysk ella útlendsk verk. Avtalan hevur sostatt virknað við avtaluloyvi sambært § 13 í upphavsrættarlógini.

**§ 3: Innanhýsis nýtsla**
Avtalan fevnir um framleiðslu av eintøkum av yrkisligum greinum í bløðum, tíðarritum og ritsøvnum og av stuttum brotum av útgivnum yrkisligum verkum, tónleikaverkum og myndlýsingum, sum eru endurgivin í tilknýti til tekstin í eitt av teim nevndu verkunum í tann mun, at innihaldið er viðkomandi fyri virksemið hjá viðkomandi stovni, sbr. § 14 í upphavsrættarlógini.

**§ 4: Avmarkingarskipan**
Avtalan gevur ikki einstaka skúlanum ella stovninum rætt til at framleiða eintøk av vardum verkum, har tað er gjørligt í hvørjum einstøkum føri at avgreiða spurningar um rættindi umvegis hald, har gjald verður kravt.

**§ 5: Viðurlag**
Fyri nýtslu sambært hesi avtalu rindar kommunan til Fjølrit kr. 200,- fyri hvønn ársnæming í fólkaskúlanum í kommununi.

Fjølrit sendir á hvørjum ári gjaldskrav til kommununa ella teir stovnar sum kommunan vísir á.

**§ 6: Aðrar treytir**
Einstøku skúlarnir og stovnarnir hava ábyrgdina av, at øll framleiðsla av eintøkum av upphavsrættarliga vardum verkum, sum hesir gera ella lata onnur gera, virða hesa avtalu. Einstøku skúlarnir og stovnarnir skulu kunna leiðslu og starvsfólk um innihaldið í hesi avtalu.

Kommunan gevur Fjølrit heimild til í samráð við skúlaleiðslum, ráð, stovnum og Mentamálaráðnum at skráseta nýtsluna í hesum tíðarskeiðið.

Stk. 2. Fjølrit hevur skyldu til at fríhalda brúkararnar fyri øll krøv, sum føroyskir ella útlendskir rættindahavarar seta fram, grundað á framleiðslu av eintøkum sambært hesi avtalu.

**§ 7: Gildiskoma, uppsøgn o.a.**
Avtalan fevnir um eitt royndartíðarskeið, við gildi frá 1. august 2018 til 1. august 2020.

Endamálið við royndartíðarskeiðnum er at kanna, í hvønn mun og hvussu fjølritan fer fram og annars at hyggja eftir skioanini í einum størri høpi enn tí danska. Henda avtalan kann ikki á nakran hátt brúkast sum fyridømi fyri møguligum seinni avtalum.

Avtalan fær gildi tá ið umboð fyri partarnar við tekningarrætti hava skrivað undir hesa avtalu.

Gildið av hesi avtalu er í síni heild treytað av, at Fjølrit í øllum avtalutíðarskeiðnum er góðkendur sum felagsskapur í Føroyum.

Partarnir eru samdir um, at tíðarskeiðið 1. august 2017 til 31. juli 2018 ikki er fevnt av hesi avtalu, men kunnu partarnir við serstakari átekning ella avtalu tó velja at lata hesa avtalu eisini galda fyri omanfyrinevnda tíðarskeið.

tann / - 2018

tann / - 2018

Vegna FJØLRIT

Vegna kommununa

______________________________

Atli K Petersen, formaður

______________________________

borgarstjóri